## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TAKA PATENT UPP Á VÁRHARRA

Tað var hugaligt at hoyra formannin í Tjóðveldi og løgmann tala at í gjár, tá íslendski forsætirsráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir og kona hennara, Jónína Léosdóttir, vórðu háðaðar fyri sína seksuellu sannføring - av føroyskum monnum - løgtingsmonnum, sum sjálvir ikki himprast við soleiðs at royna at skora sær politisk poeng við at vísa á, at onnur fólk ikki eru Guds bestu børn. Løgið kortini, at menn, sum dáma so væl at vísa seg alment við Halgubók brúka slíkar snildir at klikkja niður á onnur. Eitt gott dømi um, hvussu Guds orð verður brúkt sum fótatraðk.

Øll vita, at sjálvgørdir Guds dómarar ikki hava undirtøku í fólkinum. Tí var tað ikki minni fløvandi at hoyra Arna Zachariasen og Jens Wang, báðir virknir í brøðrasamkomuni, tala at hesum í útvarpinum. Hóast ikki samdir um samkyndan livihátt, so nýta teir sína trúgv í røttum næstrakærleiksanda heldur enn døma onnur, taka pantent upp á Várharra og soleiðis styggja fólk frá kristnari trúgv.

Hinvegin eiga vit í miðlunum at taka í egnan barm: Hví skulu vit altíð biðja tey mest rabiatu siga sína hugsan, sum til dømis í hesum máli, tá ein samkyndur stjórnarleiðari kemur á vitjan? Vit vita øll, hvat teir meina um tað at vera samkyndur. Hví er tað so áhugavert at vita, hvat hesir menn meina? Álvaratos! Hvør biðjur slíkar menn um sítt vælsignilsi?

At fornokta slíkan livihátt man vera sum at fornokta veður og vind. Nøkur menniskju hava altíð livað soleiðis, og nøkur menniskju fara altíð at liva soleiðis. Intoleransa og sjálvsøkni hevur altíð eyðkent menniskjað, og sjálvgjørdir Guds dómarar hava verið mongum menniskjum at bana gjøgnum øldirnar.

Kristin hugsunarháttur er tað so ikki at døma fólk á hendan hátt. Jesus var júst eyðkendur fyri at eta saman við fólkum, sum av sjálvgjørdum Guds dómarum vóru søgd - ofta av seksuellum livihátti - at vera óverdug og skitin.

»Tann av tykkum, sum syndaleysur er, kasti fyrstur stein á hana!« segði Jesus við teir skriftlærdu og farisearnar, tá teir komu við



kvinnuni, sum hevði drivið hor. Hesum kundu okkara heimligu »skriftlærdu« lært okkurt av.

Tað er gerðin, sum telur so nógv. Tað eru ikki orðini. Tí skulu vit øll sum kalla okkum kristin læra okkum at sýna kristindómin og næstrakærleikan í gerðum heldur enn í orðum.

Tá hevði eingin tikið pantent upp á Várhárra, og so fækkaðust teir dómarar, sum styggja fólk frá kristindóminum.

**Tað er gerðin sum telur so nógv. Tað eru ikki orðini**

## Toftamaður í toftamans stað



Faroe Seafood er í tungum sjógvi, og hevur brúk fyri hjálp.

Men hóast toftamaður er farin í land, so kemur toftamaður í toftamans stað.

Toftamaðurin Anfinn Olsen er farin í land, og í toftamansins stað er toftamaðurin Ingi Højgaard komin. Toftamaðurin Ingi Højgaard hevur álit á toftamanninum Meinhard Jacobsen, sum stjórnar felagnum - og tí verður toftamaðurin sitandi við stýrisvølin.

So er bert at vóna, at hendan fyrr so bæriliga fyritøka ikki endar í toftum...

## Jógvan orðnar alt einsamallur



- Vit hava ikki ráð at senda fótbóltslandsdystir í sjónvarpinum, sigur kringvarpsstjórin, hóast Kringvarpið hevur havt ráð til tað í 20 ár. Nevnd hevur verið upphædd, ið nærkast 100.000 krónum fyri at senda slíkar dystir. Tað er kanska ikki meira, enn fyri 20 árum síðani, men raðfestingin er kanska øðrvísi.

Eitt sindur av lagnunnar speisemi er tað, at Jógvan Arge, sum varð vrakaður og funnin ov lættur av nýggju kringvarpsleiðsluni, nú skal orðna allan landsliðsfótbóltin einsamallur - tað sama sum eitt heilt lið av útvarps- og sjónvarpsfólki, viðmerkjarum o. ø. gjørdi fyri 20 árum síðani.

Av sonnum gott, at Jógvan slapp aftur í kringvarpshitan!



## Umsita vit skilagott?

THOMAS ARABO
KJAK Á SÍÐU 15



## Navnið spillir ongan

HALGIR WINTHER POULSEN
KJAK Á SÍÐU 16

## Menningarhjálp í Miðlahúsinum

Kunnandi fundur um menningarsamstarv í Miðlahúsinum í kvøld klokkan 20.

Christian Aid er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum arbeiðir við menningarsamstarvi og neyðhjálp úti í heimi. Felagsskapurin er skrásettur í Onglandi, og virkar har tørvurin er størstur, óheft í mun til religión og húðalit. Í 2009 fekk felagsskapurin viðurkenningina »the Human Accountability and Quality Management Standard«.

Felagsskapurin kemur nú til Føroyar at kunna um sítt virksemi og um teir møguleikar, føroyingar hava at virka sum sjálvboðin ella í starvi hjá felagsskapinum.

Á fundinum í Miðlahúsinum verður eisini høvi at seta spurningar og fáa eitt prát við umboðini, sum koma úr London. Charlotte Seymour vónar, at koma á tal við nógvar føroyingar.

## Tróndur í Focus



Fríggjadagin 13. september kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Tróndi Patursson upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Tróndur Patursson er kendur fyri at hava prýtt nógvar bygningar, bæði í Føroyum og uttanlands.

Verkini á framsýningini í Galerie Focus verða innan fyri spontanu listina, ið Tróndur er kendur fyri.

Myndevnið er náttúrulýsingar, hav, klettar og bjørgini – tann stóra náttúran sum Tróndur hevur møtt.

Framsýningin verður opin til 23. september, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*